## Sjógvur var í lastini

Tá menn fóru undir at lossa íslendska farmaskipið "Hvassafell" í havnini í Rotterdam í Niðurlondum, varnaðust teir, at rættiliga nógvur sjógvur var í einari av lastunum. Í hesari lastini vóru bingjur við evninum "Aluminium Dross", sum sambært íslendskum bløðum elvir til hita, um tað kemur í samband við sjógv. Vill illa til, kann eldur koma í tað. "Hvassafell" er skip, sum íslendska reiðaríið Samskip leigar. Í gjár dugdi felagið ikki at siga, hvussu sjógvur var komin í lastina, men tað skuldu niðurlendsku myndugleikarnir kanna.



## Aalborg bjóðar Billund av

Nú verður stríð um tey, sum ferðast við flogfari til og úr Jyllandi. Floghavnin í Aalborg hevur sett sær fyri at vinna aftur tað, sum hon misti, tá flogfelagið Sterling fór á húsagang herfyri, og tað kann lættliga fáa óhepna ávirkan á floghavnina í Billund, skrivar Jyllands-Posturin. Søren Svendsen, sum er stjóri í Aalborg Lufthavn, sigur við blaðið, at ætlanin er at fáa fatur á fólki í Århus og har um vegir, sum nú brúka floghavnina í Billund. Stjórin í Billund, Jørgen Krab Jørgensen, sigur seg ikki stúra fyri kappingini.

# Linda Andrews við í X Factor 2009

**Nú fríggjadagin, tann 2. januar 2009, fer nýggja røðin av væl umtóktu, donsku útgávuni av X Factor av bakkastokki. Fyri føroyingar er tað serliga spennandi, at gospelsangarinnan Linda Andrews, ið fyri kortum gav fløguna Revelation út, er ein av luttakarunum**

SHOWBUSINESS
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Føroyska gospel divan Linda Andrews er ein av luttakarunum í donsku útgávuni av X Factor 2009, sum verður send fríggjakvøldið 2. januar klokkan 19 á DR1*
*Mynd: Bjarne Bergius Hermansen, Danmarks Radio*

Klokkan 19 fríggjakvøldið fer onnur danska útgávan av talentkappingini X Factor av bakkastokki á DR1. Fleiri føroyingar hava seinnu árini tikið lut í slíkum talent- og sangkappingum í Danmark og Íslandi, millum annað Guðrun Sólja Jacobsen, Pætur við Keldu, Jógvan Hansen, Vígdis Hentze Olsen og seinast Ragnar Finsson, fyri bert at nevna nøkur. Øll hava tey staðið seg sera væl í hesum kappingum, og hava tey flestu verið í finaluni, og enn tá vunnið kappingarnar.

Fyrst í komandi ári verður aftur ein føroyingur við í danskari talentkapping, og er tað hesuferð gospelsangarinnan Linda Andrews, ið hevur verið til upptøkuroynd til aðru donsku útgávuna av X Factor.

Føroyska gospelsongkvinnan, ið er búsitandi í Keypmannahavn, er ikki heilt ókend í tónleikahøpi uttanlands. Hon hevur millum annað framført til Danish Music Awards og Melodi Grand Prix, umframt at hon í fjør tók lut í kappingini Talent 2008 sum kórleiðari hjá gospelkórinum Gentofte Gospel.

### Føroysk gospel diva

Linda Andrews var eisini skotin upp til Planet Awards í ár, har hon var tilnevnd sum uppskot til bestu føroysku songkvinnu. Niels Uni Dam, tónleikaummælari, skrivaði soleiðs um Lindu Andrews sum grundgeving fyri tilnevningini:

»Fáar føroyskar songkvinnur munnu hava so nógvar og góðar royndir í útlondum sum Linda Andrews - Hetta nærum uttan at føroyingar hava varnast tað. Men í ár trein hon veruliga inn aftur á føroyska tónleikapallin. Henda føroyska gospel diva gav fyrstu fløguna út sum einstalkingur og spældi eina minniliga konsert á Summarfestivalinum, ið fekk ummælarar og áskoðarar at kappast um at rósa henni. Røddin er egin og teknikkurin er í serflokki. Linda hevur nógvar royndir sum kórsangari og kórleiðari, og hesar royndir, ið telja millum annað arbeiði saman við heimsstjørnum, hava givið henni eina serstakliga góða fatan av, hvussu hon fær brúkt sína rødd á bestan hátt.«

Nú ætlar hon sær aftur at gera ein vørr uttanlands, og útfallið av upptøkuroyndini til donsku útgávuna av X Factor 2009 kunnu føroyingar síggja á DR1 klokkan 19 fríggjakvøldið 2. januar.

### Nøkur av teimum, ið hava staðið seg væl í donskum og íslendskum kappingum

| | | |
|---|---|---|
| Guðrun Sólja Jacobsen, | Vinnari Stjerne for en Aften | 2003 |
| Gunnar Mikkelsen, | Vinnari Stjerne for en Aften | 2004 |
| Pætur við Keldu, | Finalistur Dansk Melodi Grand Prix | 2002 |
| Jógvan Hansen, | Vinnari Íslands X Factor | 2007 |
| Vígdis Hentze Olsen, | Vinnari Kan Du Danse | 2007 |
| Ragnar Finsson, | Finalistur Talent | 2008 |

## Jógvan Hansen møguliga umboða Ísland í Eurovision

**Vinnarin av íslendsku X Factor kappingini í 2007, klaksvíkingurin Jógvan Hansen, varð fyri kortum avdúkaður sum ein av luttakarunum í íslendsku úttøkukappingini til Eurovision 2009, sum verður hildin í 16. mai í Moskva**

EUROVISION 2009
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Millum trý tey fyrstu nøvnini, ið vórðu avdúkaði sum luttakarar til íslendsku úttøkuna til Eurovision 2009 tann 18. desember í ár, var eisini føroyski Jógvan Hansen.

Klaksvíkingurin gjørdist greiður vinnari av X Factor kappingini 2007, har hann vann á HARA systrunum við trimum fjórðingum av atkvøðunum, og hevur hann líka síðan verið ein av best umtóktu sangarunum í íslandi.

Síðan X Factor kappingina í 2007 er veruliga glið komið á tónleikakarrieruna hjá Jógvani, ið annars arbeiðir sum hárfríðkari í Íslandi, og hevur hann millum annað givið út fløguna »Jógvan«, ið var millum mest seldu fløgur í Íslandi í 2007.

Ævintýrið hjá Jógvani endar tó ikki her, hóast nógv ikki hevur verið at hoyrt til hann í seinastuni. Nú er hann nevnliga útnevndur sum ein av teimum 16, ið koma at kappast um at sleppa at umboað Ísland til Eurovision 2009, sum verður hildið í russiska høvuðsstaðnum Moskva tann 16. mai í summar.

Til undankappingina í Íslandi fer Jógvan Hansen at syngja ein sang hjá íslendska sangskrivaranum Hallgrímur Óskarsson, ið hevur ikki minni enn tveir sangir við í undankappingini. Íslendski sangarin Ingó fer at føra fram hin sangin hjá Hallgrími.

### Møguliga fyrsti føroyingur í Eurovision

Tá ið Jógvan Hansen flutti til Íslands at búgva, mundu fleiri halda, at so var liðugt hjá honum at syngja. Sangarin í poppbólkinum Aria hevði gjørt vart við seg í føroyskum tónleiki, men tá ið leiðin var løgd til Íslands, snúði tað seg í fyrstu syftu um yrki sum frisør.

Haðani gekk tað tó skjótt framá, tá hann luttók, og gjørdist vinnari av X Factor kappingini í 2007, og nú í 2009 hevur hann so møguleikan at gerast fyrsti føroyingur yvirhøvir, ið kemur at luttaka í Eurovision, tó umboðandi grannatjóð okkara, Ísland.

Tey fýra undanumførini til Eurovision 2009 verða hildin í januar mánaði, tann 10., 17., 24., og 31. januar. Enn er ógreitt, hvørt av hesum undanumførunum hann verður partur av. Sjálva finalan verður tann 14. februar, og vónandi verður Jógvan Hansen eisini at síggja tá.



*Jógvan Hansen gjørdist í 2007 vinnari av X Factor í Íslandi. Í 2009 hevur hann nú møguleikan at gerast fyrsti føroyingur, ið tekur lut í eini Eurovision kapping, tó umboðandi grannatjóð okkara Ísland.*